# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Signa og Karstin Drenkstein gullbrúdleyp



Mánadagin 14. november høvdu Signa og Karstin Drenkstein í Klaksvík verið gift í 50 ár. Dagin hildu tey saman við teirra næstu.

Signa, sum er fødd 28. apríl í 1932, er ættað úr Víkunum í Klaksvík. Foreldrini vóru Elsa og Gunnar Christiansen. Hon var úr Garðshorni í Oyndarfirði, og hann var av Kirkju og varð nevndur Gunnar úr Fugloy. Tey áttu níggju børn: Jógvan í Havnini, Erling í Klaksvík, Kemme í Klaksvík, Einar í Íslandi, Ester í Danmark, Asbjørn í Danmark, Signa í Klaksvík, Frida í Klaksvík og Garshorn í Danmark. Eftir á lívi eru Ester, Asbjørn, Signa, Frida og Garshorn.

Karstin, sum er føddur 2. august í 1930, er ættaður úr Tjørnuvík, og sum so mangir aðrir, ið fluttu til Klaksvíkar, so hekk navnið á heimbygdini uppií soleiðis, at hann ofta varð nevndur Karstin í Tjørnuvík. Foreldrini vóru Elsa og Dánjal Jákup Isaksen. Tey fingu fýra synir. Jógvan doyði ungur. Hinir eru Dávur og Ísak, sum báðir búgva í Tjørnuvík og so Karstin. Seinastu meiri enn tríati árini hevur Karstin havt Drenkstein til eftirnavn. Talan er um stein í Sjeyndum, sum liggur til Tjørnuvík.

Signa arbeiddi í nógv ár hjá Olafi á Stongunum, og seinni arbeiddi hon eitt skifti í krambúðini hjá Óla í Skúla, sum Álvur Klakk nú hevur rikið í mong ár.

Karstin kom til mans undir krígnum. Tá var ikki so lætt at fáa skipskjans. Hann var tí eitt skifti í Reykjavík og arbeiddi við hitaleiðingum. Í 1946 fór hann til skips, og millum skipini, sum hann var við, taldust skonnartirnar Loytnanturin og Liljan, og so Norðstjørnan og Havfrúgvin, sum hann var við, tá ið hon fór á land.

Eftir at Karstin í 1951 hevði tikið seturskiparaprógv í Havnini, var hann við Westward Ho, áðrenn hann fór í reiðaríið hjá J. F. Kjølbro. Hann sigldi nógv við Polarstjørnuni, sum Palli hjá Marionnu førdi. Í 1959 tók Karstin longdina á Klaksvíkar Sjómansskúla, og síðani fór hann við Klakki, sum var nýggur tá, og har var hann bestimaður í eini tíggju ár.

Í 1971 fekk Karstin sær útróðrarbát, Elbjørg. Hon var ein av teimum frambygdu, sum Arnhold Olsen og Reinhold Jacobsen smíðaðu á Stongunum. Karstin átti og dreiv bátin fram til 1982, tá ið hann seldi og av heilsuávum gavst at rógva út. Síðani tá hevur hann ofta verið á Norðoya Fornminnissavni og víst runt og greitt frá, og so hevur hann hugt til deksbátin Nólsoyar Páll, sum Fornminnissavnið eigur, og sum liggur fyri fortoyning á Vánni.

Karstin var í sjeyti árunum nevndarlimur í Klaksvíkar Útróðrarfelag, og hann hevur altíð verið avgjørdur tjóðveldismaður. Hann stuðlaði bygdarmanni sínum, Jóhan Simonsen, sála, ella Jóhan í Tjørnuvík, sum var fyrsti tjóðveldistingmaður í Norðoya valdømi, og Karstin er framvegis stillari hjá Norðoya Tjóðveldisfelag.

Signa og Karstin settu búgv í Brekkuni. Nú býr einkardótturin, Elbjørg, sum er fødd 23. november í 1962, í erva, og tey bæði gomlu í kjallaranum. Elbjørg er gift Hermanni Johannesen úr Klaksvík. Tey eiga fimm børn: Karstin, Signa, Eileen, Hermann og Tróndur, sum øll búgva heima hjá foreldrunum og harvið eisini undir somu lon sum omman og abbin á móðursíðuni.

## Regin Jespersen 60 ár



Í dag, mánadagin 21. november, verður Regin Thorleif Jespersen í Sørvági 60 ár. Hann hevur seinastu ellivu árini verið sýslumaður í Vága sýslu.

Regin er uppvaksin í Vági, men flutti seinni Eiðis. Foreldrini vóru: Ingrid og Sølvi Jespersen. Pápin arbeiddi á Loranstøðini, fyrst í Vági og síðan á Eiði.

Regin hevði lært til radiomekanikara í Runavík, áðrenn hann 15. oktober 1970, sum 24 ára gamalur, gjørdist politistanæmingur í Keypmannahavn.

Eftir lokna útbúgving varð hann settur í starv í Havnini, og har starvaðist hann, inntil hann 1. november í 1989 varð settur sum varaleiðari á politistøðini í Vágum. Fimm ár seinni - 1. november í 1994 - varð Regin settur sýslumaður í Vága sýslu. Hann loysti Marna av Kák av.

Frá 1. november í 1999 og í hálvt annað ár arbeiddi Regin við tilbúgvingarætlan fyri Føroyar. Hesa tíðina hevði hann farloyvi frá sýslumansstarvinum.

Síðani stutt undan seinasta ársskifti hevur Regin, umframt at røkja sýslumansstarvið í Vágum, eisini havt ábyrgdina av Streymoyar sýslu, sum heldur til í Vestmanna.

Regin hevur nógv og fjølbroytt áhugamál. Í Vágum leggja nógvar grindir beinini, og Regin gongur høgt upp í uppgávuna sum sýslumaður at hava høvuðsábyrgdina. Grindamannafelagið hevur fleiri ferðir havt Regin sum fyrilestrarhaldara í tí sambandinum.

Regin var í fleiri ár í nevndini í Føroya Politistafelag, har hann var næstformaður frá 1985-89.

Regin er giftur Anniku, f. Petersen, úr Klaksvík. Tey eiga tveir synir: Fríðálvur, sum býr í Havn, og Sølvi, sum býr í Sørvági. Regin eigur ein abbason, sum eitur eftir abbanum, Regin Jespersen.

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu og góða hjálp tá okkara elskaða mamma, vermamma, omma og langomma

**Dany Magnussen**

doyði og varð jarðað

*Familjunnar vegna*

**Daniella, Esbern og Kári**

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Sigrið Gudjónsson**, Klaksvík, fer úr Kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í kvøld klokkan 18.00. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni týsdagin 22. november klokkan 13.00.

Kistan við **Knút Háberg,** Tórshavn fer úr Landssjúkrahúskapellinum í kvøld klokkan 18.00 heim í Ebenezer. Jarðarferðin verður í morgin klokkan 13.00. Tey ið vilja minnast Knút, kunnu lata eina gávu til Kristnastovu, konto í peningastovnunum.

Kistan við **Kristinu Kjær** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi í kvøld klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Bethel í Vági týsdagin klokkan 13.

**Eliesar Sørensen**, vanliga nenvdur Eliesar í Fugloy, andaðist sunnunáttina á Klaksvík Sjúkrahúsi, sløk 100 ára gamal. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Johannes Martin Johannesen**, vanliga nevndur Hanne, Fuglafjørður, andaðist hósdagin, 74 ára gamal.

†

Kunngjørt verður fyri ætt og vinum at okkara kæra genta, verdóttir og svigarinna

**Kristine Kjær**
Marknoyri, Vágur

andaðist í Suðuroyar sjúkrahúsið
18. november, 47 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Bethel í Vági týsdagin kl. 13.00.

*Familjunnar vegna*

**Ebbe**

†

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum, at elskaði maður og abbi okkara

**Knút E. Háberg**

andaðist á Landssjúkrahúsinum
leygardagin 19. november, 85 ára gamal.

Jarðarferðin verður týsdagin
22. november kl. 13.00 úr Ebenezer.

*Vegna tey avvarðandi*

**Sunneva, Knút og Sunneva**

*Tey ið ynskja at minnast Knút, kunnu ístaðin lata eina gávu til Kristnastovu, konto í peningastovninum.*